## DAGSINS MEINING

# Føroyar á landkortið

Altjóða fiskivinnuframsýningin er latin upp í stóra goymslubygninginum hjá Poul Mohr á Sandvíkahjalla. Heðin Mortensen, býráðsformaður í Havn, bjóðaði vælkomin, og síðan setti løgmaður, Jóannes Eidesgaard, stevnuna. Undir setanini spældi Havnar Hornorkestur og gjørdi sítt til at seta hátíðardám á løtuna. Eitt flott tiltak! North Atlantic Fish Fair verður opin hvønn dag til og við hósdagin, frá klokkan 10 á morgni til klokkan 17 seinnapartin. Flestu framsýnararnir eru komnir til landið. Nakrir eru komnir við Norrønu, men teir flestu velja tó at flúgva. Útbúnaðurin, sum útlendsku framsýnararnir skulu brúka á NAFF, er sendur higar við skipum, sigur samskiparin.

Ein slík stevna er eitt gott og positivt tiltak, eitt tiltak, ið er við til at setga Føroyar á altjóða landkortið. Føroyar hava altíð brúk fyri at gerast kendar úti heimi. Okkara vinnulív, serstakliga tann sera stóri parturin, sum hevur tilknýti til fiskivinnuna, hevur tørv á at kunna umheimin um, tað vit duga og tað sum vit megna. Føroyskar fyritøkur eru kappingarførar á mongum økjum, og einn slík framsýning kann útvega føroyskum fyritøkum ordrar og kontaktir. Sostatt hevur framsýningin st´roan týdning fyri umsetningin hjá føroysku fyritøkum.

Men sum kunnugt eru eisini útlendskar fyritøkur á North Atlantic Fish Fair. Hetta hevur ikki minni týdning fyri føroyskar fyritøkur. Føroyskar fyritøkur fáa høvi at samanbera seg við tær fremstu útlendsku fyritøkurnar á økinum. Hetta er mennandi fyri føryskar fyritøkur, tí tað er júst við at meta seg við aðrar fyritøkur, at ein fyritøka kann mennast og gerast betri kappingarfør í framtíðini. Ein tann størsti føroyski vinnuligi trupulleikin er kappingarføri. Kappingarføri snýr seg um mangt annað enn lønir. Kappingaarføri er vitan, førleikar hjá leiðslum og starvsfólki. Kappingarføri snýr seg um evni at røkka út um landoddarnar og um at vinna sambond og um at byggja sær netverk á altjóða støði. Føroyska vinnan má nú av álvara brynja seg til altjóðagerðina. Megnar vinnan ikki hesa avbjóðing stendur illa til. Tað er m.a. í hesum ljósi vit skulu síggja eitt megnartiltak sum North Atlantic Fish Fair. Úrslitini síggja vit ikki fyrr enn seinni, men at tey fara at koma, ivast vit ikki í.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Løgmaður hevur selt allan sjálvstýrispolitikk og hevur hildið okkum øll fyri gjøldur

**Høgni Hoydal**
*form. í Tjóðveldisflokkinum og fólkatingslimur*



**Løgmaður hevur fleiri ferðir alment bedýrað, at hann fór ikki at góðtaka donsku krøvini í sambandi við uttanríkispolitisku heimildarlógina. Løgmaður heitti eisini á fólkatingslimirnar um at støðga ætlanunum hjá donsku stjórnini. Kortini hevur løgmaður nú góðtikið øll tey donsku krøvini og hevur lagt fyri løgtingið danska og føroyska lóg um uttanríkispolitikk, ið koyrir okkum langt aftur í skjútstíðina.**

Lógirnar, sum í dag eru lagdar fram, eru tann grovasta sambandslóggávan, ið higartil er sædd á Føroya Løgtingi. Eisini sum fólkatingslimur kenni eg meg hildnan fyri gjøldur. Undirritaði hevur saman við grønlendsku limunum í Norðuratlanstbólkinum lagt nógv fyri til tess at fáa støðgað grønlendsku lógini, so landsstýrið fekk ein møguleika at samráðast.

Men løgmaður hevur í dag – uttan at siga okkum frá – lagt fram tvey lógaruppskot á Føroya Løgtingi: Eina føroyska lóg og eina danska lóg um, hvørjar heimildir landsstýrið hevur at gera altjóða sáttmálar. Har er onki veruliga broytt í mun til tað, sum higartil hevur ligið á borðinum — ja, tað er helst uppaftur verri, tí nú skal Løgtingið samtykkja eina danska lóggávu, sum beinleiðis tekur vunnar heimildir frá Løgtinginum. Hetta er eitt nýtt krav frá donsku stjórnini, ið landsstýrið hevur góðtikið.

Higartil hava føroyingar tikið sær rætt at gera bindandi sáttmálar við onnur lond — serliga á fiskivinnu-, handils- og skattaøkinum. Hesar avtalur hava føroyingar gjørt í egnum navni.

- Nú verður Løgtingið biðið um at staðfesta, at føroyingar hava ongar heimildir at gera sjálvstøðugar sáttmálar við onnur lond og felagsskapir.
- Løgtingið verður biðið um at staðfesta, at danska grundlógin forðar okkum í at gera bindandi sáttmálar við onnur.
- Ístaðin skal Føroya landsstýri sleppa at gera sáttmálar vegna Danmark undir heitinum *“Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne”* — og hetta kann bert gerast, um tað ikki gongur ímóti donskum áhugamálum. Danska stjórnin skal spyrjast bæði áðrenn, meðan og aftaná landsstýrið ger nakra avtalu

Hetta brotið úr viðmerkingunum til donsku lógina, lýsir væl støðuna:

*“Som nævnt vil der ikke være tale om egentlig overladelse af beføjelser til at handle i mellemfolkelige anliggender. Regeringen vil derfor fortsat have udenrigspolitisk kompetence også i de anliggender, der omfattes af en bemyndigelse til det færøske landsstyre.*

*Hensynet til rigsenheden og grundlovens §19 indebærer endvidere, at Færøernes landsstyre ved udøvelsen af udenrigs-politiske handlinger — der som anført bliver folkeretligt bindende for hele riget — vil være afskåret fra at handle i strid med rigets interesser, herunder rigets generelle udenrigspolitik.”* (s. 6 í viðmerkingunum til ríkislógina)

Hetta stendur í skerandi andsøgn til tað, sum bæði løgmaður og formaður Fólkafloksins, Anfinn Kallsberg søgdu í fólkatingsvalstríðnum. Har vissaðu teir um, at teir fóru ikki at gera nakra avtalu, ið bant okkum til donsku grundlógina ella sum var eitt afturstig fyri Føroyar. Ja, teir vildu enntá yvirtaka uttanríkismál frá dønum.

Nú hava teir slept øllum og hava góðtikið eina danska lóggávu, sum fer at seta okkum afturum heimastýrisskipanina.

Í donsku viðmerkingunum verður somuleiðis sligið fast:

*“Aftaler som indgås i medfør af §1, betegnes som aftaler mellem enten “Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne” eller “Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne og Grønland”. Disse betegnelser viser, at Færøernes landsstyre henholdsvis Færøernes landsstyre og Grønlands landsstyre handler på hele rigets vegne og ikke som et selvstændigt folkeretssubjekt (...)”* (s.12 í viðmerkingunum til donsku ríkislógina).

Hetta merkir, at sjálvsavgerðarrætturin hjá føroysku tjóðini verður skrivaður burtur, og tað var júst hetta kravið, ið fekk undanfarna løgmann at slíta samráðingarnar við donsku stjórnina í 2000.

Tað er somuleiðis átaluvert, at landsstýrið og danska stjórnin royna at skrumbla hesi mál ígjøgnum nú fáar dagar áðrenn Løgtingið fer heim. Endamálið er greitt at støðga tí føroyska fullveldismálinum endaliga, áðrenn Danmark skal atkvøða um nýggju ES-grundlógina.

Eg fari at heita á øll, ið hava møguleikan, um at lesa lóggávuna, ið nú er løgd fram á løgtingi. Har fæst sjón fyri søgn, at allur sjálvstýrispolitikkur er sleptur og verður jarðlagdur av núsitandi samgongu. Har sæst somuleiðis, at onki av tí, sum løgmaður hevur ført fram í hesum málinum, hevur verið eftirfarandi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**

Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.